## Støðan hjá línuflotanum álvarslig



Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, heldur, at støðan hjá línuflotanum nú er somikið álvarslig, at myndugleikarnir eiga at koma við kreppuhjálp. - Tað kann ikki góðtakast, at politiska skipanin bara letur ein part av vinnulívinum doyggja. Jan sigur við Norðlýsið, at tað verður ein vanlukka, um línuflotin fer fyri bakka. - Higartil hava vit bara hoyrt undanførslur frá politisku skipanini, men skal alt ikki steðga upp, er neyðugt, at myndugleikarnir tora at handla, sigur hann. Í samrøðu við Sosialin fyrr í vikuni segði Bethuel Johannesen í Klaksvík, sum eigur og rekur línuskipið Klakk saman við beiggja sínum, Líggjasi, at hetta árið sær rættiliga dapurt út hjá línuflotanum. - Ja, eg haldi, at tað sum er sær ógvuliga svart út. Soleiðis, sum fiskiskapurin hevur verið higartil í ár, hava vit bert fiskað fyri agn og olju. Her liggur einki eftir, sigur hann.

# Neyðugt er at taka forðingar burtur

**- Nú stendur rættiliga á gomlum nøglum hjá línuflotanum. Fiskiskapurin er vánaligur, og fiskaprísirnir eru í botni. Neyðugt er, at línuskip, sum eitt nú veiða hýsu, fáa so fríar teymar sum tilber at landa fiskin, har mest kann fáast fyri hann, sigur Jóhannus M. Olsen, formaður í Felagnum Línuskipum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tey fyrstu línuskipini eru nú løgd og loysa ikki aftur, fyrr enn umstøðurnar vónandi gerast betri aftur. Fiskiskapurin higartil í ár hevur verið vánaligur, og serliga prísirnir á hýsu eru søguliga lágir, nú so fáir keyparar eru til hýsuna í Føroyum.

Tað var tann tíð, tá hýsa lítlan og ongan prís hevði. Men síðan vit fyri nógvum árum síðan fingu fleiri og fleiri fiskavirkir á landi, sum fóru at virka dýrar vørur burtur úr hesum fiskaslagi, fekk hýsa, sum tann góði fiskur hon er, eisini sín prís, tó at fiskaprísir altíð vilja vera skiftandi.

Síðan fiskavirkið í Miðvági læt aftur, Kósavirkið í Klaksvík fór í gjaldssteðg og minkandi virksemi hevur



*- Nú trupult er at finna keyparar til hýsu í Føroyum, er neyðugt, at myndugleikarnir taka av allar forðingar fyri sølu, har mest kann fáast fyri veiðina, sigur Jóhannus M. Olsen, formaður í Línuskipum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

verið á Norðís Seafood á Eiði, hevur eftirspurningurin eftir hýsu í Føroyum eisini verið minkandi.

Hetta hevur so aftur gingið álvarsliga útyvir hýsuprísin, sum nú er søguliga lágur.

### Okkurt má gerast

Jóhannus M. Olsen, formaður í Felagnum Línuskipum og reiðari á línuskipunum, Eysturoyingi, Sigmundi, Morgunstjørnuni og Mascot, sigur, at Eysturoyingur er lagdur, tí tað loysir seg ikki at hava skipið siglandi, soleiðis sum gongdin er.

Seinastu tíðina hevur línuskipið Thomas Nygaard eisini ligið í Søldarfirði, men tað hevur ikki eydnast okkum at fingið fatur á reiðaranum, Háldani Haldansen í Vestmanna fyri at fregnast um støðuna.

- Jú, tað stendur rættiliga á gomlum nøglum hjá okkum nú. Tí er avgerandi neyðugt, at myndugleikarnir tryggja okkum so fríar teymar sum gjørligt at selja



*Fyrstu línuskipini eru løgd, nú fiskiskapurin er so vánaligur, og prísurin á eitt nú hýsu er søguliga lágur. – Sum er, er ikki grundarlag fyri at loysa skipið, sigur reiðarin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

veiðina, har mest kann fáast fyri hana. Hetta hevur ongantíð verið so neyðugt sum nú, um línuflotin skal hóra undan kreppuni.

Jóhannus vísir á, at nú so fáir keyparar eru til hýsu í Føroyum, er eingin meining í verandi forðingum um eitt nú 25% hámark fyri sølu uttanlands.

Hann heldur eisini, at treytin um sølu um góðkenda uppboðssølu, áðrenn fiskurin kann seljast av landinum, eisini er ein óneyðug forðing í tíðum sum hesum.

- Neyðugt er, at vit sleppa undan hesum bindingum, soleiðis at átøk kunnu skipast við tí endamáli at fáa mest møguligt fyri línufiskin.

### Stóran týdning

Formaðurin í Línuskipum leggur dent á, at Fiskamarknaður Føroya hevur havt ógvuliga stóran týdning fyri línubátarnar.

- Sjálvandi fara vit ikki at gevast at selja um uppboðssøluna, men soleiðis sum støðan er í løtuni, hevði tað tænt okkum best, um vit vóru púra frítt stillaðir.

Jóhannus M. Olsen mælir tí politiska myndugleikanum til at taka burtur tær forðingar og bindingar, ið eru fyri fríari sølu av línufiski.

- Fyri okkum hevði tað verið ein fyrimunur í løtuni, um myndugleikarnir broyttu kravið um ”góðkenda uppboðssølu” til ”føroyskan bryggjukant” í staðin. Tá kundu vit eitt nú selt ein part av okkara veiði sjálvir - uttan annað hóvasták, leggur hann aftrat.

Formaðurin í Felagnum Línuskipum sigur, at soleiðis, sum støðan er í løtuni, er tað bara ein spurningur um tíð, nær línuflotin liggur.

# Nú kemur mynstulønartrygdin væl við

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er í tíðum sum hesum, at mynstulønartrygdin hjá fiskimonnum kemur væl við. Hetta er ikki minst galdandi fyri teir, sum sigla við línuskipunum, nú prísirnir á hýsu og øðrum fiskasløgum eru sera lágir.

Formaðurin í Felagnum Línuskipum, Jóhannus M. Olsen, sigur, at trupulleikin hjá línuskipum í dag ikki er manningartrot, sum annars hevur merkt hendan partin av flotanum seinnu árini.

- Nei, í dag er høvuðstrupulleikin, at so lítið fæst fyri fiskin, sum línuskipini veiða. Haraftrat kemur, at fiskiskapurin í seinastuni hevur verið vánaligur.

Hann vísir á, at nú ferðin á samfelagshjólunum er minkað nakað, eru tað menn, sum spyrja um kjans við línuskipum aftur.

- Vit merkja, at áhugin fyri at søkja sjógvin aftur er veksandi, tí her hava menn hóast alt eina inntøku.

Jóhannus M. Olsen vísir á mynstulønartrygdina, sum kemur væl við hjá monnum í tíðum sum hesum.

- Soleiðis, sum gongdin er, skal nógv til, áðrenn menn koma upp um minstulønina, og tað er júst í tíðum sum hesum, at henda kemur fiskimonnum til góðar, sigur formaðurin í Felagnum Línuskipum.

